UTTAN ÚR HEIMI

## Alt ella einki

Júst sum norska stjórnin fyrireikar seg til at taka avgerð um at loyva oljufeløgunum at bora í Barentshavinum, boðar Statoil frá, at verða loyvi ikki givin á minst trimum leiðum, fer felagið als ikki at bora í Barentshavinum.

Sambært norska útvarpinum royna sterkar kreftir í stjórnini at forða fyri, at feløgini sleppa at bora í einum øki, sum eitur Goliat. Men leitistjórin hjá Statoil, Tor Fjæran, sigur við NRK, at sleppur felagið ikki at bora í Goliat-økinum, fer felagið als ikki at seta borin í botnin í Barentshavinum. Leitistjórin sigur, at verða loyvi ikki givin í øllum trimum økjunum, er tað ikki fíggjarliga forsvarligt at bora yvirhøvur. Í oljuvinnuni verður hildið, at Barentshavið fer at fáa størri týdning fyri norsku vinnuna enn leiðirnar í Norðsjónum.

Tað er serliga flokkurin Vinstri, sum er ímóti at loyva oljufeløgunum at bora í Goliat-økinum, sum er vestan fyri Nordkapp. Flokkurin kann loyva feløgunum at bora í hinum báðum økjunum, men krevur, at myndugleikarnir áleggja oljufeløgunum sera strong umhvørviskrøv.

## Flogfar fekk hol á vongin

Eitt av ferðafólkunum umborð á einum flogfari hjá teilendska flogfelagnum Orient Thai Airlines varnaðist mánadagin, at eitt stórt petti brádliga datt av øðrum vonginum.

Flogfarið var statt í 10.000 metra hædd og var á veg úr Hong Kong til Chiang Mai í Teilandi, tá óhappið hendi. Ferðafólkið, sum varnaðist, hvat hendi, tók myndatólið og tók eina mynd av vonginum, meðan flogskiparin snaraði flogfarinum og setti kós aftur til Hongkong, har flogfarið lendi í øllum góðum.

Kanningar í Hong Kong vístu, at eitt petti, sum var 80 ferðir 100 centimetrar, var dottið av øðrum vonginum, men hví tað var dottið av, er ikki greitt.

## Arnold stevndur

Ein kvinna, sum fyrr hevur lagt guvernørin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, undir kynsligan ágang ímóti sær, hevur nú stevnt guvernørinum fyri ærumeiðing.

Rhonda Miller var ein av teimum sekstan kvinnunum, sum undir valstríðnum upp undir guvernørvaldið vildu vera við, at Schwarzenegger hevði gjørt seg inn á tær kynsliga. Hon sigur nú, at guvernørurin nýtti ærumeiðandi orð, tá hann avsannaði skuldsetingarnar.

Undir valstríðnum segði Rhonda Miller, at Schwarzenegger hevði togað blusuna av henni, og at hann síðani hevði tikið myndir av bróstum hennara. Hetta hendi, tá filmurin "Terminator 2" bleiv tikin upp. Stuðulsmenninir hjá guvernørvalevninum vístu hesum aftur, og teir avdúkaðu ymiskt meiri ella minni ivasamt um fortíðina hjá Rhondu Miller. Tað vísti seg kortini aftaná, at stuðulsmenninir høvdu mistikið seg, tí upplýsingar teirra snúðu seg um eina aðra kvinnu, sum eisini eitur Rhonda Miller.

## AP framgongd

Í Noregi fær Arbeiðaraflokkurin stóra framgongd í einari nýggjari meiningakanning.

Kanningin, sum Gallupstovnurin hevur gjørt fyri blaðið VG og sjónvarpið TV2, gevur Arbeiðaraflokkinum 27,5 prosent av atkvøðunum. Tað er 2,5 prosentstig meiri, enn flokkurin fekk í einari kanning í síðsta mánað. Kanningin gevur eisini tveimum av teimum trimum stjórnarflokkunum framgongd. Høgri fær eitt prosentstig afturat og fær 17,5 prosent, Vinstri fær eisini eitt prosentstig afturat og fær 3,5 prosent, meðan Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell magne Bondevik, forsætisráðharra missir 0,5 proisentstig og fær 5,5 prosent.

Í andstøðuni er tað bara Arbeiðaraflokkurin,sum hevur framgongd. Framburðsflokkurin missir 2,5 prosent og hevur nú 20,5 prosent, og Sosialistiski Vinstriflokkurin missir 0,5 prosent og fær 16,5 prosent.

# Oljufeløgini ongantíð dálkað so illa sum í ár

**Oljufeløgini, sum eru virkin á norska landgrunninum, hava ongantíð dálkað so illa sum í ár**

DÁLKING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Alt bendir á, at árið í ár verður metár, tá tað snýr seg um dálking hjá feløgunum, sum reka oljuvinnu á norska landgrunninum.

Sambært myndugleikunum mistu feløgini 1050 rúmmetrar av olju og kemiskum evnum út í havið teir fyrstu seks mánaðarnar í ár, og tað var tvær ferðir meiri enn alt árið í fjør. Tá mistu tey 516 rúmmetrar. Út frá hesum rokna myndugleikarnir við, at feløgini hava ongantíð dálkað so illa sum í ár. Tað gamla metið er frá 1999, tá oljufeløgini mistu 1121 rúmmetrar av olju og kemiskum evnum út í havið.

Oljufeløgini á norska landgrunninum hava annars givið myndugleikunum lyfti um, at aftan á 2005 fara tey ikki at dálka havumhvørvið. Men kunningarstjórin hjá Shell í Noregi, Einar Knudsen, sigur við NTB, at tað ber ikki til at tryggja seg ímóti slíkari dálking.

# Á skíðum í býin



*Rættiligur stórkavi er lagstur í fleiri av teimum stóru býunum við amerikonsku eysturstrondina. Her eru vit í býnum Portland í statinum Maine, har hesin maðurin hevur valt at taka skíðirnar fram heldur enn bilin.*

# "Scandinavian Star" má kannast umaftur

**Fyrrverandi ovastin hjá løgregluni í Oslo heldur, at kanningararbeiðið, sum varð gjørt í sambandi við vanlukkuna við ferjuni "Scandinavian Star", má kannast. Ivaspurningarnir eru ov nógvir, sigur hann**

KANNING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tá 159 fólk doyðu av eldi umborð á ferjuni "Scandinavian Star" í 1990, var var Leif A. Lier løgregluovasti í Oslo. Nú sigur hann, at alt ov nógvir leysir endar eru í sambandi við vanlukkuna, og at fleiri spurningar eru framvegis ikki svaraðir.

Tí hevur hann skotið upp, at sjálvt kanningararbeiðið aftan á vanlukkuna verður kannað. Við Dagbladet sigur Leif A. Lier, at nógvar gitingar, áskoðanir og metingar eru komnar fram aftan á vanlukkuna, og sum ikki vórðu tiknar við í sjálvum kanningararbeiðinum. Tí heldur hann, at ákæruvaldið eigur at seta eina óhefta nevnd at kanna, um hald er í tí, sum er komið fram.

– Tað snýr seg ikki um at kanna, hví eldur kom í skipið. Men eg haldi tað vera neyðugt at kanna sjálvt kanningararbeiðið, sum varð gjørt her í Noregi, so vit fáa at vita, hvat vit gjørdu, og hvat vit ikki gjørdu, sigur Leif A. Lier við Dagbladet.

Í Danmark kannar statsadvokaturin í løtuni eisini eina áheitan um at taka eitt mál um "Scandinavian Star" uppaftur. Her snýr tað sum um eigaraviðurskiftini í reiðarínum og um tryggingarsvik.



Aksel verður yngstur maður umborð:

# Misti pápan umborð á Tróndi í Gøtu

**Aksel Mikkelsen, sum er 20 ára gamal, verður yngstur maður umborð á nýggja Finni Fríða. Síðan hann var 15 ára gamal, hevur hann loyst av umborð á Tróndi í Gøtu í summarfrítíðini**

YNGSTUR UMBORÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vit sita við eitt borð á Comfort Hotel Bryggen í Ålesund. Eru júst komin uppá pláss og eru settir við borðið til ein góðan bita. Fleiri enn 40 fólk vóru við í ferðalagnum úr Føroyum. Í morgin verður nýggi Finnur Fríði – enn ein stoltleiki hjá gøtumonnum – navngivin á Langsten-skipasmiðjuni í Tomrefjørðinum.

Við borðið sita bæði tilkomnir og ungir menn.

Spurt verður, hvør yngstur maður verður umborð á nýggja skipinum.

Jú, tað verður hasin – Aksel, sigur ein av teimum tilkomnu og peikar yvirum borðið. Meira verður ikki tosað um tað, men eg hugsi við mær, at kanska fara vit at venda aftur til unga mannin.



### Doyði umborð

Í endanum av røðu síni á Langsten-skipasmiðjuni dagin eftir, biðir reiðarin, Jákup Jacobsen, mannamúgvuna minnast í tøgn ein av parteigarunum, sum doyði av vanlukku umborð á Tróndi í Gøtu.

Tá ið stilla løtan er av, spyr onkur, hvør maðurin er, sum var fyri hesi vanlagnu - og nær syndarliga hendingin fór fram.

Jú, hetta hendi í 1992, meðan skipið lá á Fuglafirði. Maðurin var Jákup Mikkelsen úr Syðrugøtu.

Tá ið navngevingin er av, røður eru hildnar. og ein góður biti er etin á skipasmiðjuni, verður farið umborð á stásiliga skipið.

Uppi á brúnni gongur Aksel. Vit spyrja, hvussu tað hongur saman við, at hann nú hevur fingið fastan kjans umborð.

Er tú sonur onkran av teimum 11 eigarunum, spyrja vit – og uttan at hugsa um tað, verður eisini spurt, um pápin er við í ferðini.

- Nei, pápi mín er deyður. Tað var hann, sum doyði umborð á Tróndi í Gøtu.

Er mamma tín meðni her, spyrja vit aftur.

Jú, hon er; hon stendur har yviri, sigur fryntligi unglingin og peikar yvir í hin endan av brúnni.

*Aksel undir liðini á mammu síni, Ragnu. Tað var maður Ragnu og pápi Aksel, Jákup Mikkelsen, sum doyði umborð á Tróndi í Gøtu í 1992, meðan teir lógu á Fuglafirði og riggaðu til*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Fýra børn

Vit fara yvir til hennara, og eg spyrji, um vit kunnu taka eina mynd av teimum báðum.

Hon er blíð og fyrikomandi og sigur, at tað kunnu vit saktans.

Ragna Mikkelsen er mamman, ættað úr Runavík.

Hon sigur, at maðurin og pápi Aksel, Jákup Mikkelsen, doyði umborð á Tróndi í Gøtu, 14. apríl 1992.

- Hendingin fór fram, meðan teir lógu á Fuglafirði og riggaðu til, sigur hon.

Tey áttu fýra børn, sum í 1992 vóru í aldrinum, 2-11 ár.

Aksel, sum gjørdist studentur í summar, sigur, at hann í fyrsta lagi ætlar sær at fáa siglingstíðina.

- Gongur alt, sum ætlað, fari eg seinni á skúla, har eg ætli mær at fáa eina skipsføraraútbúgving, sigur Aksel Mikkelsen at enda.

# Tey hava bæði fingið nýggjan »køk«

**Umstøðurnar hjá kokkinum umborð á nýggja Finni Fríða eru sera góðar. – Her er rúmligt og nossligt, og allur útbúnaður er til taks, sum ein kokkur hevur brúk fyri, sigur John Jarnskor, sum hevur verið kokkur umborð á Tróndi í Gøtu øll árini, síðan skipið kom**

FINNUR FRÍÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Gøtumaðurin, John Jarnskor, verður kokkur umborð á nýggja Finni Fríða. Hann er ein av partaeigarunum í Tróndi í Gøtu, og hevur siglt við skipinum øll árini, síðan skipið kom í okkara fiskiskipaflota. Nú fer hann so umborð á nýggja skipið.

John sigur, at umstøðurnar hjá kokkinum eru sera



*John og Anna Maria Jarnskor í kabússini umborð á nýggja, Finni Fríða; hann kokkast umborð - hon í landi*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

góðar. Tað er rúmligt og nossligt, og allur útbúnaður er til taks, sum ein kokkur hevur brúk fyri.

– Nýtt umborð á Finni Fríða, sum ikki er umborð á Tróndi í Gøtu, er eitt nú ein sonevndur kombi-dampari, ið er ein sera væl egnaður steikiovnur, sum eisini kann brúkast til epli.

Í fylgi við John umborð á Finni Fríða eftir, at skipið seinasta leygardag varð navngivið, var eisini kona hansara, Anna Maria.

Vit spurdu hana, um hon kanska var eitt sindur øvundsjúk, nú maður hennara hevur fingið bestu umstøður at arbeiða undir í sínum "køki".

Men áðrenn Anna Maria fekk stundir at svara, segði John, at konan hevði einki at grenja um, tí hon hevur sjálv fingið nýggjan køk heima við hús.

Saman við manni sínum, fegnast Anna Maria um góðu umstøðurnar umborð á Finni Fríða.

Hon heldur ikki, at hon hevði viljað býtt um við mannin, soleiðis at tað var hon, sum var umborð - og hann í landi.

### Eisini á dekkinum

Einir 10-11 mans verða við nýggja skipinum, og John heldur ikki, at tað er trupult hjá einum einsamøllum kokki umborð at ambata manningini.

Spurdur, um hann hevur stundir at hjálpa til á dekkinum, tá Ið løtur eru, har minni er at gera í kabússini, sigur hann, at honum dámar væl at vera á dekkinum.

– Jú, eg plagi at vera á dekkinum, tá ið høvið býðst og nógv er at gera, sigur hann.

Sum kokkur, bakar John breyð og annan bakstur til manningina.

Vit spurdu eisini Onnu Mariu, um maðurin ger mat, tá ið hann er heima, men tað fingu vit hana ikki at siga.

– Nei, heima við hús eri tað eg, sum syrgi fyri matgerðini.

### Útbúgvin kokkur

John er annars útbúgvin kokkur. Hann er sonur Martin Juul Jarnskor, og taldist í sínari tíð millum allar fótbóltsstjørnurnar, sum Martin og konan eiga.

John og Anna Maria, sum búgva í Havn, eiga 3 børn, sum eru millum 12 og 22 ára gomul.